# Talgildur samleiki

## Viðkomandi strategiir

TALGILDU
FØROYAR
01100110 01101111

# Innihaldsyvirlit

Útveitingar strategi ... 3
Útveiting av lyklamiðstøðini (CA) ... 3
Partnararavtalur ... 3
Mobil ID ... 3
Kort ID ... 4
Almenn útveiting ... 4
Verksetingar strategi ... 5
Verkseting av tænastuveitarum ... 5
Verkseting fyri borgarar, virki og starvsfólk ... 5
Konverterings strategi ... 6
Sjálvvirkandi konvertering ... 6
Hálvt sjálvvirkandi konvertering ... 6
Manuel konvertering ... 6
Sjálvvirkandi stovnan av fulltrúa mandatum ... 6
Kunningarstrategi ... 7
Politiski myndugleikin ... 7
Almenningurin ... 7
Tænastuveitarar ... 7
Virkir og stovnar ... 7
Risikostrategi ... 9

# Útveitingar strategi

Sambært Heildarætlanini Talgildu Føroyar frá 1. oktober 2015 skal alt, sum kann, verða útveitt. Talgildingin av samfelagnum førir við sær nógvar nýggjar vitanartungar uppgávur og gevur grundarlag fyri at menna nýggjar KT-loysnir, ið hóska til smá samfeløg. Talgildingin er tí eitt givið høvið at styrkja og fjølga um føroysku KT-vinnuna í breiðastu merking.

Talgildur samleiki er samansettur av fleiri pørtum, og er tað tí gjøgligt at velja at handfara ymisku partarnar á ymiskan hátt. Niðanfyri er uppskot til, hvussu teir einstaku partarnir kunnu útveitast.

## Útveiting av lyklamiðstøðini (CA)

Lyklamiðstøðin er ein so týðandi og avgerandi partur av Talgildum Samleika, at ein vanlig útveiting ikki verður mett at vera rætti framferðarháttur. Tøknin um henda partin er sera kompleks. At gera vanligt útveitingartilfar til henda partin vil tí krevja luttøku av serfrøðingum við serligari vitan á økinum. Tá ætlanin er, at føroyskir veitarir skulu kunnu bjóða uppá uppgávuna, verður neyðugt at heinta hesa servitan uttanífrá fyri at kunna gera útveitingartilfarið. Samstundis mugu teir føroysku veitararnir, sum ynskja at bjóða uppá uppgávuna, fara gjøgnum eina tilsvarandi tilgongd fyri at fáa til vega kvalifiseraða vitan um neyðugu tøknina, fyri at vera førir fyri at koma við einum nóg góðum tilboði uppá uppgávuna.

Í staðin fyri vanliga útveitan verður tí mælt til eina aðra tilgongd í mun til at skipa og reka CA og aðrar týðandi partar av skipanini. Mælt verður til at fremja eina undangóðkenning av potentiellum føroyskum veitarum.

Teir undangóðkendu veitararnir velja tvey umboð hvør, sum saman við umboðum fyri tað almenna og møguliga eisini umboðum frá peningastovnunum kanna, hvussu CA er skipað í øðrum londum. Á henda hátt fæst til vega ein felags fatan av, hvussu ein CA kann ella eigur at verða etablerað og rikin.

Út frá hesum felags arbeiðinum verður gjørt hóskiligt útveitingartilfar, herundir ásetingar av metingarstøði (kriteriur). Við støði í tilfarinum kunnu teir prekvalifiseraðu partarnir koma við tilboði uppá raksturin av lyklamiðstøðini. Partarnir fara síðani hvør til sítt og ein meira vanlig tilgongd fer fram í sambandi við at geva boð uppá uppgávuna við spurnarumførum v.m.

## Partnararavtalur

Í hesum uppskotinum til loysn, sum er lýst av verkætlanarbólkinum, eru partar av loysnini, har mælt verður til, at tað almenna keypir kenda tøkni sum part av verkætlanini. Í hesum førunum verður ikki talan um útveiting, men samráðingar verða um eina partnaraavtalu við tann ella teir veitarar, sum kunnu koma við tøknuligu loysnunum.

### Mobil ID

Royndir eru gjørdar við Mobil ID-skipanini hjá Gemalto (fyrr Valimo). Talan er um roynda tøkni (er m.a. í brúk í Íslandi) og verkætlanarbólkurin mælir til, at Mobil ID-loysn frá Gemalto verður keypt og etablerað í sambandi við CA. Hetta merkir, at tann føroyski veitarin, sum kemur at reka CA, eisini kemur at vera etablerings- og rakstrarpartnari fyri Mobil ID loysnini.

Mælt verður tó til at tað almenna ger eina partnara-avtaluna um Mobil ID við Gemalto. Tað er sostatt tað almenna, sum hevur stýringina av SLA og búskapinum fyri veitingunum frá Gemalto.

Í sambandi við Mobil ID loysnina er somuleiðis tørvur á at samráðast um eina formliga avtalu við føroysku tele-veitararnar (Føroya Tele og Vodafone), har tað verða ásett krøv til SLA og búskap viðvíkjandi teirra parti av loysnini.

### Kort ID

Viðvíkjandi Kort ID-loysnini er endalig avgerð ikki enn tikin um, at hetta skal vera partur av talgilda samleikanum. Verkætlanarbólkurin mælir tó til at eitt alternativ verður skipað til Mobil ID, sum kann brúkast av teimum, sum av ymiskum orsøkum ikki kunnu brúka Mobil ID-loysnina. Mælt verður tí til at gjørd verður ein Proof of Concept (PoC) av Kort ID skipanini hjá Gemalto.

Við støði í hesum PoC verður gjørligt at taka týðandi avgerðina, um Kort ID skal bjóðast sum alternativ til Mobil ID.

Um avgerð verður tikin um at keypa Kort ID loysnina frá Gemalto, skal - á sama hátt sum viðvíkjandi Mobil ID - samráðast um eina partnara-avtalu. Gerst Kort ID loysnin veruleiki, er ætlanin at henda loysnin á sama hátt sum Mobil ID skal vera ein partur av avtaluni við tann føroyska rakstrarveitaran, soleiðis at hesin veitari eisini verður etableirings- og rakstrarpartnari fyri Kort ID loysnina.

Í sambandi við Kort ID verður tørvur á at gera minni avtalur við útlendskar framleiðarar av kortum, út yvir avtaluna við Gemalto um sjálva loysnina. Tað kann møguliga vera ein fyrimunur at hyggja at framleiðarum, sum teir føroysku televeitararnir frammanundan nýta til at gera SIM kort.

## Almenn útveiting

Talgildur samleiki fevnir um tríggjar partar afturat, sum skulu mennast av føroyskum veitarum. Mælt verður til at fara gjøgnum vanligar útveitingartilgongdir i sambandi við hesar veitingar. Gerast skal vanligt útveitingartilfar, sum kann almannakunngerast í almennu útveitingini millum føroyskar veitarar.

Útveitingartilfarið inniheldur m.a.:

- Kravfesting
- Krav til veitarar (hvør kann bjóða)
- Tíðarkrav
- Metingarstøði/kriteriir

Teir tríggir partarnir, sum kunnu útveitast á henda hátt, eru:

- Webservices integratións-lag
- Samleikasíðan
- Umsitingarsíðan

Hóast hesir partar verða útveittir hvør sær, verða útveitingartilgongdinar framdar samstundis, soleiðis at til ber at velja sama veitara til fleiri av veitingunum, um tað er fyrimunur at samskipa partarnar. Hetta má framganga av útveitingartilfarinum og hædd skal takast fyri hesum í metingarstøðinum.

Í verkætlanargrundalagnum fyri fremjan av Talgildur Samleiki er ein ætlan fyri, hvussu útveitingartilgongdin í síni heild kann skipast.

# Verksetingar strategi

Tá skipanirnar eru lidnar, lóggávan er gjørd og organisatiónin fyri Talgilda Samleikanum er skipað, kann Talgildur Samleiki verksetast.

Verksetingin av Talgilda Samleikanum verður gjørd í tveimum pørtum:

## Verkseting av tænastuveitarum

Verksetingin verður gjørd í einum, har Talgildi Samleikin beinan vegin verður tilgongiligur og virkar í útgongustøðinum sum trygt login til borgaravendar tænastur, sum tænastuveitarar hava gjørt avtalu við lyklamiðstøðina (CA) um.

Byrjað verður við peningastovnunum og almennu tænastunum hjá TAKS. Síðani verður arbeitt við at fáa fleiri tænastuveitarar at brúka skipanina, og so hvørt, sum teir eru klárir, fáa teir atgongd til at brúka Talgilda Samleikan sum trygt log-in.

## Verkseting fyri borgarar, virki og starvsfólk

Fyri at loysnin við talgildum samleika skal hava meining, er neyðugt at føroyingar brúka loysnina. Tí skal farast undir eitt átak, sum fær borgararnar at stovna sær ein talgildan samleika.

Í einum byrjunartíðarskeiði uppá 3-4 mánaðir verður farið í holt við eina kampagnu, m.a. har farið verður um landið við eini rullandi skrivstovu, sum kann hjálpa fólki í gongd við at brúka skipanina og fáa tey skrásett, um tey ikki hava gjørt tað frammanundan. Málið er at hava 75% av borgarunum í aldrinum 18-60 sum virknar brúkarar av Talgilda Samleikanum við endan á kampagnuni við rullandi skrivstovuni.

# Konverterings strategi

Tá ein konverterings strategi verður umrødd, er tað við støði í, at skipanin við talgildum samleika er breidd út sum lýst omanfyri. Konverteringsstrategiin er ein ætlan fyri, hvussu verandi skráir yvir brúkarar hjá tænastuveitarum sjálvvirkandi, hálvt sjálvvirkandi ella manuelt kunnu fáa lagt afturat eID - sum er lykilin til talgilda samleikan – til upplýsingarnar um brúkararnar.

## Sjálvvirkandi konvertering

Fyri teir tænastuveitararnar, sum hava møguleika at brúka p-talið í teirra skrá yvir viðskiftafólk/brúkarar, er gjørligt at seta í verk eina sjálvvirkandi tilgongd, har tænastuveitarar fáa atgongd til eina tænastu, har teir við p-talinum kunnu spyrja uppá eitt brúkara eID og harvið dagføra sína brúkaraskrá við tilhoyrandi eID.

Tilgongdin fyri at fáa dagført eID kann fremjast sum hóp-dagføringar, sum verða gjørdar dagliga/vikuliga/adhoc, ella við at tænastuveitarin spyr um eID on-line, tá brúkarin er loggaður á tænastur hjá tænastuveitaranum við talgilda samleikanum fyrstu ferð.

## Hálvt sjálvvirkandi konvertering

Teir tænastuveitarar, sum ikki hava upplýsngar um p-talið hjá sínum viðskiftafólkum/brúkarum, men har viðskiftafólkini longu hava eitt log-in til tænasturnar, verður neyðugt at seta í verk eina hjálvt sjálvvirkandi tilgongd, sum fer fram soleiðis:

1. Brúkarin velir at logga á tænastuna hjá tænastuveitaranum við sínum vanliga login. Tá brúkarin er loggaður á, verður spurt um hann hevur talgildan samleika.
2. Um brúkarin svarar ja til at hann hevur talgildan samleika, verður hann biðin um at logga á við sínum talgilda samleika. Á henda hátt fær tænastuveitarin upplýst eID hjá brúkaranum, og kann leggja tað afturat upplýsingunum í kundaskránni um brúkaran.

## Manuel konvertering

Nýggir tænastuveitarar, sum vilja bjóða nýggjar tænastur og nýta talgilda samleika sum login, hava brúk fyri at gera eina ætlan fyri tilgongdina saman við CA. Tilgongdin er tengd at, hvør loysnin er, sum skal etablerast.

Bæði peningastovnar og TAKS hava møguleika at brúka sjálvvirkandi tilgongdir fyri at konvertera brúkara atgongdina. En møguleiki fyri at umganga konvertering er við at lata Talgilda Samleika lata p-talið til tænastuveitarar, sum hava loyvi til at bruka p-talið sum samleikaváttan.

## Sjálvvirkandi stovnan av fulltrúa mandatum

Um endaliga avgerð verður tikin um, at loysnin við talgildum samleika eisini skal fevna um fulltrúa mandatir, er eisini við í loysnini, at tænastuveitarir skulu kunnu stovna fulltrúa mandatir til egnar tænastur fyri borgarar og fyritøkur. Fyri at gera hesa tilgongd so smidliga sum til ber, verður ein web-tænasta gjørd tøk fyri tænastuveitarar, har til ber at stovna fulltrúa mandat millum ávikavist tveir eID'ir ella eitt eID og eitt v-tal. Henda web-tænastan kann brúkast sum hóð-dagføring, sum kann verða gjørd dagliga/vikuliga/adhoc ella online við umsitingarsíðuni ella við eini loysn hjá tænastuveitaranum til hetta.

## Kunningarstrategi

Fyri at verkætlanin skal hepnast, mugu flest allir føroyingar hava tikið hana til sín. Kunningin frammanundan verksetan hevur í hesum sambandi stóran týdning, soleiðis at greitt er frá, hvussu skipanin virkar, fyrimunir og vansar eru lýstir, og svar eru á øllum týðandi spurningum, so fólk kenna seg trygg við skipanina.

Primeru málbólkarnir eru:

### Politiski myndugleikin

Hesin málbólkur hevur brúk fyri at vera kunnaður um gongdina í verkætlanini, um frávik eru í tíðarætlan og fíggjartørvi.

### Almenningurin

Av tí at verkætlanin kemur at hava týdning fyri allar føroyingar, má almenna kunningin hava høga raðfesting. Ein partur av hesi kunning er upplæring í skipanini, har vektin eigur at vera løgd á brúkið av skipanini - gjarna við cases. Ítøkuliga skal framleiðast kunningartilfar, sum frammanundan verksetingini greiður frá, hvat fer at vera gjørt, umframt ítøkuligar vegleiðingar og spurningar-og-svar um skipanina.

Nakað av kunningartilfarinum, sum skal framleiðast, er:

- ”Soleiðis nýtur tú tín Talgilda Samleika” (tekst + film). Kunning um skipanina sum heild og fleiri styttri partar um ávís evni
- Allýsingar av øllum viðkomandi hugtøkum (talgildur samleiki, kvalifiserað undirskrift, tænastuveitari v.m.)
- Vegleiðingar um trygd á alnótini
- Um handfaring av Talgilda Samleika-kotum v.m.
- Avleiðingar, um treytirnar ikki verða hildnar
- Hvør hevur ábyrgdina í sambandi við peningaligan miss
- Einstaku tænastuútbjóðararnar hava vegleiðingar og mannagongdir fyri sínar skipanir
- Lýsing av, hvar til ber at fáa support og annars vanligir kontaktupplýsingar

### Tænastuveitarar

Nógvar føroyskar fyritøkur og stovnar fara at hava møguleika at brúka talgilda samleikan sum trygt log-in til sínar talgildu tænastur. Hesir hesir potentiellu professionellu brúkarar av skipanini skulu kenna seg tryggar við skipanina og vera kunnaðir um tíðarætlan, um nýtslu av skipanini og fyrimunir og vansar við skipanini.

Tænastuveitarar, sum fara at nýta skipanina sum trygt log-in, skulu sjálvir gera vegleiðingar til síni viðskiftafólk um, hvussu skipanin virkar og tær tænastur, sum kunnu avgreiðast við talgilda samleikanum.

### Virkir og stovnar

Talgildi samleikin letur upp fyri, at fyritøkur kunnu røkja síni sambond við tað almenna og tænastuveitarar, so sum peningastovnar og tryggingar, á ein annan og greiðari hátt, enn frammanundan, við tað at log-in kann gerast um eina leið. Virkir koma eisini at kunna stýra teim heimildum, sum verða latnar starvsfólkum og øðrum, í eini miðsavnaðari skipan við Talgilda Samleikanum.

Samlaða kunningarátakið, sum skal gerast og byrja áðrenn verksetina, kann m.a. innihalda:

- Høvuðsboðskapirnar í kunningini.

- Val av kanalum (www, tíðindaskriv, radio, lýsingar, faldarar o.a.)
- Tíðarætlan fyri einstaku átøkini.

Fakliga innihaldið í kunningini (t.d. spurningar-og-svar) kemur frá Talgilda Samleika–toyminum. Fyri at tryggja, at boðskapir í kunningini standa púra greiðir og kanalval verður gjørt so gott, sum til ber, verða kunningarráðgevar við til at planleggja og fremja endaliga kunningarátakið.

## Risikostrategi

Skipaninar, sum tilsamans eru kjarnin í Talgilda Samleikanum, koma at hava sera stóran samfelagsligan og vinnuligan týdning. Fyri brúkararnar koma tænasturnar eisini at vera avgerandi fyri, hvussu til ber at avgreiða síni viðurskifti við tað almenna og við týðandi vinnuligar tænastur, so sum peningastovnar og tryggingarfeløg. Tí er tað avgerandi fyri skipanina, at hon er trygg og at brúkarar kenna seg tryggar við at brúka sín talgilda samleika til avgreðslu av talgildum tænastum.

Trygdarstøðið verður lagt uppat trygdarstandardum, sum verða brúktir aðrastaðni. ES leggur seg upp at ISO-standardum, men hevur harumframt ávís herd krøv. Skipanir og mannagongdir, sum hava við Talgilda Samleikan at gera, eiga at uppfylla hesi trygdarkrøv, har vit frammanundan kenna mong av teimum, td. í sambandi við bankaskipanir.

Yvirskipað eru serlig trygdarkrøv fyri skipanina og fysisk krøv til hølir v.m. Viðv. skipanunum eru krøv til ritbúnað og forrit og krøv um back-up, dubblering, atskild KT-umhvørvi etc. og krøv til starvsfólk, sum arbeiða við skipanini. Tað verða eisini sett krøv til tænastuveitarar, sum vilja nýta Talgilda Samleikan sum trygt login til sínar tænastur. Og fyri at tryggja sær at trygdarkrøvini verða hildin, skal vera serligt eftirlit og uppfylging av tøknuliga partinum av skipanini, sambondunum og umsitingini av skipanini.

Brúkararnir skulu kunnast væl um trygdarviðurskifti, og um hvussu teir kunnu verja seg og skipanina best møguligt. Fyri at trygdarkrøvini verða tikin í neyðugum álvara, skulu ásetast avleiðingar, um brot av ósketni ella við vilja verður gjørt á trygdarforskriftirnar, og skulu brúkararnir greitt kunnast um hesar.